# sær



## Gjaldið er ein forðan

Fýra ferðir um árið er ókeypis at koyra gjøgnum Norðoyatunnilin. Tá kemur rættiliga nógv fólk til Klaksvíkar, men nógv fólk fara hinvegin yvirum á meginlandið.

Fyri handlarnar í Klaksvík er eingin ivi um, at tunnilsgjaldið er ein stór forðan fyri teirra virksemi. Fyri tey er loysnin einføld: Gjaldið má lækka!

Nógv fólk á meginøkinum høvdu uttan iva verið oftari í Klaksvík, um so var. Við verandi gjaldi er tað ikki soleiðis, at ein bara líka ger sær ein innkeypstúr higar ella bara fyri at hyggja eftir vørum.

Skulu tey velja at fara til Runavíkar ella Klaksvíkar, fellur valið helst oftari á Runavík, tí hagar er einki eykagjald sett á.

- Í míni verð er eingin ivi um, at var gjaldið lægri, so høvdu uppaftur fleiri bilar koyrt gjøgnum tunnilin.

- Eg ivist onga løtu í, at tunnilin hevði einki mist, men hevði heilt víst fingið príslækkingina inn aftur, sigur formaðurin í Handilsfelagnum.

# Tey flestu vilja búgva heima

**Ein verkætlan sum Føroya Kommunufelag hevur luttikið í, vísir greitt, at tey eldru í Føroyum vilja búgva heima**

TEY ELDRU
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Seinnapartin í gjár legði Eyðun Kristiansen, verkætlanarleiðari fram niðurstøðurnar frá hesi kanningini sum ber heitið "Okkara lív sum eldri".

Framløgan var í Tilhaldinum í Havn, har rættiliga nógv fólk vóru komin at lurta.




*- Húsini hjá teimum eldru eru vælhildin og hava lítla skuld, men eru ofta óegnað sum bústaður hjá eldri, staðfesti Eyðun Kristiansen*

*Mynd: Snorri Brend*

Tað eru fólk ymsastaðni frá í landinum, sum hava luttikið í hesi trý ára verkætlanini, sum er gjørd saman við ávísum kommunum í Svøríki, Noregi, Finlandi og Skotlandi.

Í kanningini varð staðfest tað, sum flest øll helst munnu gruna, at tey eldru vilja búgva heima so leingi sum tilber.

Ikki færri enn 70% av teimum eldru ynsktu hetta, - og tað gera tey, hóast tey meta egnu hús síni at vera í størra lagi og ikki beinleiðis egnað sum bústaður hjá eldri.

Verkætlanin, har Føroya Kommunufelag stóð fyri til føroyska partinum, var gjørd í samstarvi við kommunur, útbúgvingarstovnar og felagsskapir í fleiri av grannalondum okkara.



*Kanningin hevði stóran áhuga hjá teimum eldru*

*Mynd: Snorri Brend*